## DAGSINS MEINING

# Sambandið má vísa hógv

So kom tað hartil, at størsti flokkur á valinum, Sambandsflokkurin, slapp at royna seg í samgongusamráðingunum. Tjóðveldisflokkurin gjørdist ov stuttur. Hann kundi ikki ganga við til tað, sum hinir tríggir flokkarnir vóru samdir um. Ella sagt øðrvísi: hinir flokkarnir kundu ikki góðtaka tað, sum Tjóðveldisflokkurin kravdi.

Løgmaður tók tí ta skilagóðu avgerð at venda sær til Sambandsflokkin, men tað løgna hendi sambart ÚF, at forkvinna floksins var vorðin knottin ella formermað av tí viðferð hennara flokkur hevði fingið undir samráðingunum. Endin gjørdist, at flokkurin fór til samráðingarborðið. Slíkt eigur ikki at henda og gagnar ongum, serstakliga ikki teimum mongu veljarunum hjá Sambandsflokkinum, sum hava sett sítt álit á, at teirra flokkur kom við í samgongu.

Nú tá flestu aðrir samgongumøguleikar eru úttømdir er greitt, at ABCD kann gerast ein bæði arbeiðsfør og sterk samgonga, tó at borgarligi vongurin hevur munin og væl tað. Hetta merkir, at Javnaðarflokkurin kann fáa eina trupla uppgávu, men verður telvað rætt og hugburðurin hjá samgonguflokkunum er at finna semjur heldur enn at dyrka konfrontatiónina, so eigur hetta at kunna gagna øllum samfelagnum.

Tað er greitt, at Fólkaflokkurin við at lata Tjóðveldisflokkin fara sín veg og biðja Sambandsflokkin koma til samráðingar, er gingin rættiliga langt, og kanska eisini traðkar á ein part av sínum veljarum. Tað má tó sigast, at løgmaður hevur tikið eina skilagóða og djarva støðu við at lurta eftir veljarans dómi við at taka báðar stóru andstøðuflokkarnir inn, nú gamla samgongan misti meirilutan. Hesa torføru støðu løgmans eigur B og serstakliga forkvinna tess ikki at misbrúka ella undirmeta. Sambandið má ansa eftir ikki at yvirspæla leiklut sín, men heldur síggja avgerðina hjá løgmanni sum ein upplagdan møguleika at kunna umsita tað álit flokkurin hevur fingið frá veljarunum á besta hátt.

Skal tí nakað skilagott spyrjast burtur úr hesum samgongumøguleikanum má B førka seg frá sínum gamla sambandspolitikki og vera við til at fremja tann stig fyri stig politikk á sjálvstýrisleið, sum bæði A,C og D standa fyri. Sambandið má eitt nú til at góðtaka tann lista yvir yvirtøkur, sum hesir flokkar hava lagt upp til, eitt nú yvirtøku av kirkjuni.

Tað eru óivað nógvir javnaðarveljarar, sum eru vónsviknir av, at tað ikki eydnaðist at fáa eitt samstarv við E. Tað kunnu teir so takka E fyri, tí hann kravdi meira enn tað hinir tríggir flokkarnir kundu ganga við til. Hesir vildu ganga við til einar 16 yvirtøkur og harvið halda fram við sjálvstýristilgongdini. Undanfarna samgonga framdi bert eina yvirtøku.

Tað er nú at vóna, at sambandsleiðslan ikki setir kíla í henda seinasta samgongumøguleikan við antin at spæla fornermað – nakað, sum ikki hoyrir heima í politikki - ella við at seta fót fyri teimum yvirtøkum, sum eru komnar á borðið. Okkurt bendir tí á, at tann breiða semjan kring miðjuna í føroyskum politikki hevur sigrað og fer at fáa samfelagið inn í eina tryggja og skilagóða tilgongd – og har kósin móti størri sjálvbjargni og sosialum rættvísi heldur fram.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Loysnir heldur enn politiskan sjónleik

**Tórfinn Smith**
*býráðslimur*



Fyri at fólk skulu fáa eina greiða mynd av støðuni í sambandi við at undirritaði gjørdi av at taka av tilboðnum at koma við í býráðssamgonguna, vil eg við hesum greiða frá gongdini og hví eg tók hesa avgerð:

Tá úrslitið av býráðsvalinum var greitt, - Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin fýra umboð hvør, Tjóðveldisflokkurin trý og Javnaðarflokkurin tvey, sást, at torført var hjá Javnaðarflokkinum at koma upp í part í eina samgongu. Allir aðrir møguleikar vóru eyðsýndir. Sum einasta møguleika at fáa Javnaðarflokkinum politiska ávirkan, boðaði eg øllum flokkum til fundar beint eftir valið, har eg mælti til at ganga áður óroyndar leiðir, soleiðis at allir 13 býráðslimir fóru at stinga politisku kósina út uttan meiriluta ella minniluta. Hendan royndir fekk tó ikki undirtøku. Ístaðin tóku teir báðir størstu flokkarnir, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin, seg saman, og skipaðu eina samgongu.

Tey fýra valskeiðini, eg frammanundan hevði verið í býráðnum, var eg fyrru tvey í minniluta og tey seinru í meiriluta. Eg var tí eisini fult greiður yvir hvør troystasleysa oyðimarkarferðin er hjá einum býráðslimi í minniluta, og tað havi eg ongantíð dult fyri nøkrum. Hetta fyrsta árið hjá sitandi samgongu havi eg kortini roynt at meðvirka konstruktivt, uttan eg tó kann siga, at eg havi havt størri ávirkan á førda politikkin.

Fyrst í januar fekk eg í boði at koma upp í samgonguna. Mín fyrsti spurningur var, um hetta tilboð var galdandi fyri bæði javnaðarumboðini. Svarið var, at tilboðið var til bert mín. Tá eg, nakrar fáar dagar seinri hevði ein fund við býráðsformannin, endurtók eg spurningin, men svarið var eins greitt og fyrr. Eigin skal ivast í, at eg heldur enn fegin vildi og vil, at bæði umboð Javnaðarfloksins gjørdust partur av býráðssamgonguni.

Eftir at eg hevði hugsað gjølla um tilboðið, sendi eg Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skriv dagfest 11. januar 2002, har eg boðaði frá hesum, og segði meg sinnaðan til at koma á fund við nevndina og hitt javnaðarumboðið, har eg kundi greiða nærri frá. Á hesum fundi ráddi nevndin mær frá at fara í samgongu um ikki bæði javnaðarumboðini vóru við.

Hetta tók eg til eftirtektar, og m.a. eisini havandi í huga løgtingsvalið, valdi eg at bíða til eftir valið. Tá løgtingsvalið var av, greiddi eg Elini Lindenskov frá, at eg framhaldandi var sinnaður at fara upp í samgonguna. Somu boð fekk formaðurin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Tað sum síðani er hent er væl og virðiliga lýst í fjølmiðlunum, men lat meg enn einaferð gera greitt, hví eg tók hesa avgerð.

Tá eg hevði fingið tilboðið um at koma upp í samgonguna hevði eg tvinnar møguleikar í at velja. At siga nei takk og halda fram í minnilutanum uttan nakra sum helst politiska ávirkan. Hin møguleikin var at fara upp í samgonguna, og fáa ávirkan. Tað valdi eg. Og hví?

At borgarin velur sær eitt umboð í eitt nú býráðið er, at hetta umboðið fær møguleika at virka fyri tí hann ella hon undan valinum hevur sagt seg vilja virka fyri.

Hvussu ofta og hvussu fegin hava javnaðarfólk ikki tikið orðini hjá navnframum norðurlendskum javnaðarstatsmanni til sín um at politikkur er at vilja? Vilja broytingar! Vilja ávirka samfelagið! Eg havi ongantíð hoyrt um nakran sum fer upp í politikk og ikki vil hava ávirkan! Hvussu talaðu og skrivaðu eisini vit á javnaðarlistanum ikki undan valinum um vánaligu korini hjá eitt nú teimum gomlu, sum hava røkt fyri neyðini. Hvussu talaðu og skrivaðu vit ikki um umhvørvisspurningar? Um barnaansing, vinnumál, alternativa íbúðarbygging o.s.fr.

Tá eg nú fekk møguleikan at gerast ein partur av samgonguni í Sosialu Nevnd og Heilsu- og Umhvørvisnevndini sum formaður, umframt at varðveita sessirnar í Havnarnevndini og Mentamálanevndini, helt eg meg koma nærri eini loysn av m.a. hesum málum, heldur enn at sita í andstøðu og illskast inn á onnur, at ikki nóg mikið verður gjørt.

Eg haldi, at vit hava í ríkiligt mát upplivað politiskan sjónleik og taktiskt spæl, har einki skilagott kemur burturúr. Tað veljarin - borgarin í Tórshavnar Kommunu - ynskir og hevur brúk fyri eru loysnir. Uttan mun til partapolitiskt spjaldur hevur ein og hvør býráðslimur skyldu til at umboða allar borgararnar í kommununi. Og tað er júst tað eg vil, og sum eg nú havi fingið betri møguleikar til, - framvegis sum sannførdur javnaðarmaður.

# Ferðaleiðarar aðalfund

TÍÐINDASKRIV

2. mars 2002 hevði Føroya Ferðaleiðarafelag aðalfund. Á skránni vóru millum annað broytingar av nevnd felagsins. Bette Johansen ynksti ikki at halda fram sum fastur limur í nevndini, og í hennara stað bleiv Ólavur Hansen valdur. Bette heldur tó fram sum eykalimur. Nevndin hevur síðani skipað seg soleiðis, at Bergur Samuelsen er formaður, Hilda Thomsen næstformaður, Ólavur Hansen skrivari, Anna Elena Skaalum kassameistari, umframt at Jóhanna Hansen eisini er í nevndini. Eykalimir eru Bette Johansen og Jóhanna T. Poulsen.

Felagið er eitt áhugafelag, sum m. a. hevur til uppgávu støðugt at stuðla og menna verandi ferðaleiðarar, umframt at halda nýggjum fólki til. Tað er stórur tørvur á ferðaleiðarum í summarmánaðunum, og hesin tørvur tykist bara at vaksa, við tað at ferðavinnan sum kunnugt bara veksur ár undan ári.

Seinastu árini hava, í hesum sambandi, tvey útbúgvingskeið verið fyriskipað av ferðaleiðarum her í Føroyum. Slíkt skeið er í umbúna at gera aftur til heystar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Føroya gull vorðið Føroya umhvørvistrupulleiki

**Nicolina Jensen Beder**



Løgið er við hugsunarsambandi (association). Hoyrdi í útvarpinum nú ein dagin, at Landsstýrið vildi geva 500 túsund krónur um árið í 5 ár fyri at innsavna ullina í Føroyum. Seljarin skuldi í fyrstu atløgu fáa 4 kr. fyri kilo. Og í somu løtu hoyrdi eg fyri mær John Mogensen syngja: »Det er noget galt i Danmark« og við óhøviskum orðum siga frá, hvussu illa statt tað var við »Dybbøl Mølle«. John Mogensen, ið var samfelagsrevsandi yrkjari, gjørdist rættiliga kendur av hesi yrking í 1971. Eg minnist Marius Johannesen, fyrrv. háskúlastjóra, koma inn á gólvið, hann var skelkaður av, at slík yrking um »Dybbøl Mølle« kundi sendast gjøgnum útvarpið. Tíðindi um ullina komu fleiri ferðir, og hvørja ferð hoydir eg John Mogensen við vísu síni. Eg hugsaði við mær sjálvum, at um Gøtu Tróndur hevði vaknað við aftur, hevði hann neyvan verið mjúkari í orðum um ullina, enn John Mogensen var um »Dybbøl Mølle«.

Tað tvørsagnarliga (paradoksala) við hesum tíðindum er, at tey koma ein góðan mánað aftan á, at vit í Sosialinum hava lisið um nýsælendingin, sum í eini 4-5 ár hevur verið í Føroyum og rakað (barberað) seyðunum við elmaskinu, aftan á at seyðurin er væl filaður, soleiðis, at bæði verandi og komandi ull verður oyðiløgd. Síðst í juli mánað kunnu vit síggja seyð renna runt í haganum, sum suðuroyingurin tók til á sinnið, sum skoldaðar apur. Ólíka vakrari er at síggja eina væl fílaða ær fara av rættini, har kvívurin var amboðið. Í sama Sosiali stendur, at Royndarstøðin í Kollfjaðardali hevur keypt tvær elmaskinur til sama endamál. Skilji tað, hvør ið vil. Hetta er ímóti allari føroyskari siðvenju. Var tað eitt skip, ið hevði gingið so illa um fiskin, hugsi eg, at teir høvdu mist fiksiloyvið. Elmaskinan hoyrir til einullaðan seyð.

Hin føroyski seyðurin er tvíullaður, t.v.s. hevur rót og brodd, og út frá hesum eginleika er tað, vit hava okkara siðvenju. Av einum og sama seyði kunnu vit fáa trý sløg av tógvi, nappað, samfingið og broddatógv (toggarn). Tann stóri trupulleikin er, at fyri at fáa tað góða mjúka tógvið, má ullin nappast.

Hvørji eru so ráðini til at taka. Jú, fyrst og fremst, at allir, sum seyð hava, taka seg saman í eitt felag eins og í øðrum londum. Gera ein miðdepil, har øll ullin verður savnað. Til ber ikki á hesum sinni at greina út í æsir, hvussu hetta gongur fyri seg. Bert kann eg siga, at í Noregi hava teir eitt felag, sum eitur »Norges Kjøtt og Fleskecentral«. Hesin felagskapur gevur ágóða bæði til teir, ið selja, og teir, ið keypa. Har fáa teir, ið ullina selja, um teir lúka ásettu góðskukrøv, verðinsmarknaðar prís, meðan verksmiðjurnar kunnu keypa flokkaðu ullina aftur fyri nógv lægri prís. Til dømis fekk seljarin í 1986 kr. 54,20 fyri kilo, sum verksmiðjan kundi keypa aftur fyri kr. 15,20. Í øðrum londum hava tey nógv ymisk seyðasløg, har ullin verður flokkað hvør fyri seg eftir eginleika, tá ber til at keypa ull eftir ynski.

Skal ullin í Føroyum hava nakað sum helst virði, er heilt neyðugt at æla fram teir góðu eginleikarnar í ullini. Eitt annað, sum er líka átrokandi, er at burturæla arvaeginleikarnar frá útlendskum seyði. Sjálvt um tað ikki hevur verið loyvt at innflyta seyð tey seinastu 40 árini, eru arvaeginleikarnir líka treiskir sum arvasyndin í Luthers Katekismus.

Eitt, sum eg tó eri bangin fyri, er farið í søguna, er at nappa við hond. Um ymisk smá feløg høvdu tikið seg saman fyri at nappað nóg stóra nøgd og sent tað inn undir einum, hevði tað kanska verið møguligt at fingið tað spunnið á spunavirkjum.

Av og á síggja og hoyra vit ábreiðslur um, at tøtingarvirkini innflyta fremmanda ull; men sigi mær, hvørjar aðrar møguleikar hava tey, tá ið ikki ber til at fáa nappaða føroyska ull?

Eg veit um mann, sum hevur lagt stóra orku og nýtt nógva tíð uppá at finna fram til eina maskinu, ið bæði kann vaska og nappa. Seinast, eg spurdi hvussu gekk, var svarið, at hann hevði roynt at fingið fígging, men tað hevði ikki eyðnast. Nú er tað eg spyrji, hava vit ráð til at lata vera? Um tað skuldi eyðnast, at maskinan var nýtilig, eri eg vís i, at bæði Noreg og Ísland høvdu verið fegnir. Teir hava roynt í felag at funni fram til somu maskinu, men tað hevur ikki eyðnast enn. Eg vil halda, at tað er so umráðandi at fáa roynt hetta, at sjálvt um tað ikki eyðnaðist, var tað eina roynd vert.

Eitt, sum eisini verður neyðugt, er at fáa eitt litingarvirki. Byrja kundi verið í smáum.

Lesa vit um seyð, tað verði seg í føroyskum ella útlendskum bókum, verður støðugt víst á, at á oynni »Soay« á St. Kilda finnist enn sama seyðaslag, óblandað, sum vit høvdu á »Lítlu Dímun«. Hevði tað ikki verið áhugavert at fingið nakrar fáar seyðir av hesi oyggj og til dømis havt teir úti í Koltri?

Nú fáa vit so at síggja, hvussu fyrsta royndin við at innsavna ullina fer at roynast.

Góða eyðnu!

# Svøvnskarvar í verkfalli

**Mass Jensen**
*urtagarðsmaður og knæbóndi í Nólsoy*

Nú farið er inn í fjóru verkfallsvikuna hjá Skipara- og Navigatørfelagnum, kann ein bert øtast um tað virkisloysi í eyðkennur hetta fakfelag. Tað tykist løgi, at verkfallið bert er vent ímóti okkum, ið búleikast á útoyggj. Hetta er búskaparliga veikastu økini í landinum, t.v.s. her eru ongar kapitalsterkar fyritøkur, sum kunnu leggja trýst ið munar á myndugleikarnar.

Hetta tykist mær at vera at leypa á, har garðurin er lægstur. Tað er munur á monnum/kvinnum. Tá í Starvsmannafelagið fer í verkfall eru allir limir virknir sum blokaduvaktir, dag og nátt - fyrst og fremst í meginøkinum. Hetta leggur tann partin av landinum lamnan, har tað svíðir mest. Harvið verður verkfallsskeiðið styttri, og eingin kann leggja Starvsmannafelagið undir at seigpína útjaðaran soleiðis, sum nógv hava fatan av, at Skipara- og Navigatørfelagið er í ferð við at gera nú.

Nú veit eg ikki hvør orsøkin til virkisloysi felagsins er. Tað kann verða leti, vantandi dirvi, ella ráðaloysi. At verða í verkfalli krevur, at fakfelagslimir eru aktivir. Við øðrum orðum blokera, har tað ger mun tvs. fyrst og fremst í Tórshavn. Nú er tað ikki nakað dulsmál, at okkara fíggjarmálaráðharri í sínum borgarliga starvi er er danskur leigusveinur og tískil kundi hugsast at boðsent sínum vápnabrøðrum bæði teimum við skambyrsu og teimum við tøkutonnum og hala. Søgan vísir tó, at um blokaduvaktirnar eru nóg nógvar í tali, er lítið at ræðast frá teirri síðuni.

Um navigatørarnir halda seg vera ov illa mannaðar til tílík tiltøk, kundu teir biðið um hjálp. Undirritaði kundi saktans ofra nakrar tímar, sum blokadumaður, um tað kundi stytt um hetta óskil, og helst eru fleiri við mær.

Fyri undirritaða merkir tað, at Ritan ikki siglir, at ógjørligt er at flyta tey tungu amboðini ímillum Nólsoy og Tórshavn, soleiðis, sum eg havi lagt mítt virksemi til rættis. Tað merkir mistar inntøkur, ikki bara í apríl maj, men tað sum eftir er av árinum.

Starvsmannafelagið torir, Føroya Arbeiðarafelag torir, spurningurin er, hvat Skipara- og Navigatørfelagið torir, annað enn at veita sínum limum eina eyka summarfrítíð.

Mín vón skal verða, at Fíggjarmálastýrið treytar sær, at sáttmálaskeiðið í framtíðini gongur út tá ein vika er farin av januarmánaða, so verða tað ikki vit útoyggjafólk, sum millum annað royna at fáa nakað burtur úr jørðini, sum á hvørjum ári skulu gerast svartiper.

Skuldi tað hent, at Skipara- og Navigatørfelagið fekk ein sáttmál, teir kunnu verða nøgdir við, so skriva teir søgu, so er tað helst fyrstu ferð, at eitt fakfelag hevur sovi seg til ein sigur.

Livst - so spyrst.



# Nýggir løgtingslimir

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*

Eg havi, eins og ein av fyrstan tíð bleiv drigin av bløðum, sum smádrongur eisini verið drigin av útvarpi, sjónvarpi, fakfeløgum og politisku flokkunum í Havn.

Eg havi áhuga í hvussu tjóðin og arbeiðandi verkafólkið skipar seg kring alt landi úti í landsins kommunum, ið skulu fáa skipa langtíðar fíggjar- og íløguætlanir.

Eg havi áhuga í, at tit raðfesta / prioritera tey bleytu virðini, so sum familja, trivnaður, barnaansing og eldrarøkt, frammarlaga og útbyggja heimarøktina um alt landi.

Eg havi áheitan á tykkum nývaldu løgtingslimir um at hugsa um tey lokalu samfeløgini, so hesi fáa tær somu tænastur, sum Havn/Suðurstreymoy bjóðar sínum borgarum.

Eg havi eisini áhuga í ítrótti og mentan og list, ið skulu fáa tey bestu lívskor at virka undir so børn, ung, tilkomin og eldri kunnu trívast úti í lokalu samfeløgunum.

Eg havi víst á týdningin at fáa alt útbúna og útlærda fólki út aftur til heimstaðarkommunurnar, so at lokalu samfeløgini verða førd víðari. Tí tá slepst undan stagnatión.

Eg havi áheitan á veljarar hjá politiskum flokkum, um at halda á fram við at vera politiskt aktiv og fáa politiskt innlit í politisku ideologiir / ismur við ymiskum heiti.

Eg havi víst á týdningin at fáa dagføring av øllum lóggávum / skipanum / dagligum mannagongdum / kunngerðum / reglugerðum innan føroysku fyrisitingarnar.

Eg havi víst á týdningin at fáa tillagað fyrisitingarliga og vinnuliga virksemi at tæna viðskiftafólki eins úti í landsins kommunum - tað ongatíð ov skjótt.

Eg havi ómetaliga nógv upp á hjarta og havi fingið ávirkan á lands- / kommunal politikkin sum hugsjónarmaður, framskygdur við visiónum í kjakinum.

Eg havi givið alment til kennar hvørjar hugsjónir / hugburðir / málburðir, ið ein hevur, og hvønn politik ein vil reka fyri at tæna vanliga medmenniskjanum.